# Arabisk sjónvarpsrás vísir føroyskt møti



**Fyrireikarin Jeffri Johannesen letur væl at ferðini hjá George El Khoury. Hann hevur verið kring landið og greitt frá sínari lívssøgu. Møtið úr Kelduni verður víst á hansara sjónvarpsrás**

TRÚARLÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

George El Khoury úr Libanon hevur síðstu vikuna verið í Føroyum, har ið hann hevur havt møtir og fyrilestrar. George verður kallaður Guds bankamaður, tí at hann var ein ríkur framstandandi bankamaður, áðrenn hann gjørdist kristin.

Hansara lívssøga um, hvussu hann stríddi seg fram til pengar og ríkidømi og síðani valdi alt hetta frá fyri at gerast evangelistur, er ein spennandi søga. George vaks upp í Libanon undir trongum korum, men hann stríddi seg uppeftir innan bankaheimin. Hann gjørdist ein av teimum heilt stóru kanónunum, tá ið hann menti eina nýggja inn- og útlánsskipan.

### Vendi aftur til konuna

Áðrenn George gjørdist heilt kendur, varð hann giftur einari libanesiskari kvinnu, sum hann fekk fýra børn saman við. George tímdi tó ikki at vera bundin, og tá ið hann fekk bjóðað starv í Belgia, rýmdi hann frá konu og børnum. Hóast hann livdi eitt lív, sum nógv av okkum droyma um, so var hann ikki nøgdur. Ikki fyrr enn hann gjørdist kristin gjøgnum sonin Walid, fann hann tann friðin, sum hann hevur leitað eftir alt lívið.

- Eg skilji ikki, at nakar orkaði meg, tá ið eg var ríkur. Eg dugi nú at síggja, at eg havi verið ein býttlingur, segði George, tá ið hann støkk inn á gólvið í Miðlahúsinum hósdagin.

- Øll familjan hjá mær gjørdist kristin um somu tíð gjøgnum sonin hjá mær Walid. Stutt eftir hetta møttust eg og fyrrverandi konan aftur, og vit giftust aftur í 1999. Hon hevði ikki havt samband við nakrar annan mann, hóast vit hava verið sundur í meira enn 30 ár. Eg havi livað eitt flýggjasligt lív við nógvum konufólki, men nústani eri eg lukkuligur, sigur maðurin, sum nú er evangelistur og rekur eina kristiliga sjónvarpsrás í heimlandinum Libanon.

- Tú kanst av sonnum kalla meg hin burturvilsta sonin, sum er vendur aftur til konuna, familjuna og heimlandið, sigur George.

### Møti vísast í arabiska heiminum

Tað er Jeffri Johannesen, sum hevur fingið George til Føroya. Hann letur væl at ferðini hjá honum.

- Tað hevur gingið heilt væl. Tað vóru um 25 fólk í Miðlahúsinum fríggjakvøldið. Hann greiddi frá um sína søgu, og fólk settu spurningar. Til skeiðið í Kelduni leygardagin vóru 70-80 luttakarar, og tað var meira enn væntað. Til morgunmøtið í Oasuni vóru 100 fólk og til møti í Kelduni um kvøldið møttu 250-300 fólk, sigur Jeffri.

- Møtið í Kelduni varð tikið upp, og tað skal vísast á Spirit Channel, sum er sjónvarpsrásin hjá George. Sostatt fer arabiski heimurin at síggja hetta møtið, sigur Jeffri.

George El Khoury fór avstað í morgun.

## Starvsfólk til FT Net

**Starvslýsing**
Søkt verður eftir einum el-installatøri og einum elektrikara til Byggideildina hjá FT Net.

Byggideildin hjá FT Net rekur og viðlíkaheldur allar bygningar hjá samtakinum Føroya Tele. Bygningarnir, sum eru 120 í tali, eru skrivstovu- og goymslubygningar, tøknihús og telebúðir.

Á deildini starvast frammanundan tekniskur atstøðingur, rørsmiður, húsasmiður, elektrikarar, byggifrøðingar, el-installatørar og maskinmeistari. Deildin telur 12 starvsfólk.

Fjøltáttaða ábyrgdarøkið hjá byggideildini er m.a rakstur av:

- Øllum bygningunum hjá samtakinum Føroya Tele
- Sterk- og javnstreymi, íroknað NO-break, einsrættarar, invertarar v.m.
- Neyðstreymmotorum
- Køli- og ventilatiónsskipanum
- Trygd, t.e. teknisk trygd, brunatrygd, umsjón við atgongd til bygningar og útgerð o.a.
- CTS (Central TilstandsStyring) og IBI (Intelligent Bygnings Installation) skipanum
- Skráseting av omanfyristandandi

Harafturat verða um- og nýbyggingar og tekniskar bygningsinstallatiónir prosjekteraðar á Byggideildini.

**El-installatørur:**
Tann, ið settur verður, kemur m.a. at arbeiða við:

- Prosjektering av javnstreymi (rakstrarbattaríum)
- Útbjóðingartilfari og innheintan av tilboðum
- Eftirliti í sambandi við uppsetan og tilsetan av battaríum
- Prosjektering, rakstur og viðlíkahald av sterk- og veikstreymi
- CTS
- Skráseting

Upplæring fer fram í sambandi við starvssetan umframt neyðug skeið.

Fyrimunur er, um umsøkjari:

- Er el-installatørur ella hevur aðra viðkomandi tekniska útbúgving
- Er virkin og tekur ábyrgd
- Er nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Er fyrikomandi og hevur lætt við at samstarva
- Hevur kunnleika til enskt
- Hevur hollan teldukunnleika

**Elektrikari:**
Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða við:

- Montering av breiðbandútgerð
- Montering av rakstrarbattaríum
- Rakstur av battaríum
- El-installatiónum, bæði sterk- og veikstreymi

Umsøkjarin skal:

- Vera elektrikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving
- Vera nærlagdur
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt
- Vera fyrikomandi og vera førur fyri at arbeiða saman við øðrum
- Hava teldukunnleika

Størvini verða sett sum skjótast. Starvsøkið verður um alt landið, tó við høvuðsstøð í Klingruni í Hoyvík.

Løn og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Kára Dal-Christiansen, deildarleiðara, á telefon 303030 ella fartelefon 243651.
Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Umsóknir skulu merkjast "**el-installatørur**" ella "**elektrikari**", vera Føroya Tele í hendi seinasta lagi 7. november 2006 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
FO-110 Tórshavn

FT Net er dótturfelag hjá Føroya Tele. FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, sum fevnir um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. Endamálið er at tryggja øllum veitarum somu atgongd til netið. FT Net hevur sett sær fyri at geva øllum í Føroyum samskiftismøguleikar á hægsta dygdarstigi, so føroyingar gerast virknir luttakarar í altjóða samfelagnum. Umleið 70 fólk starvast hjá FT Neti.

ft•net